# Kann gerast ein dyggur smeitur fyri suðuroyingar

**Fáa kommunurnar sín vilja, so at vit noyðast at betala fleiri milliónir afturat í havnagjøldum, kann hetta gerast ein dyggur smeitur fyri suðuroyingar, sigur stjórin á Strandferðsluni**

STRANDFERÐSLAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Fáa kommunurnar sín viljað, so at Strandferðslan noyðast at betala fleiri milliónir meiri í havnagjøldum, kann tað koma at raka siglingina hjá Smyrli til og úr Suðuroynni hart, sigur stjórin á Strandferðsluni*

– Hetta kann fara at raka siglingina hjá Strandferðsluni ógvuliga hart. Ikki minst suðuroyarsiglingina við Smyrli.

Tað heldur Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni.

Stjórin á Strandferðsluni er ikki heilt foreintur við, at kommunurnar nú krevja, at Strandferðslan betala fleiri milliónir meiri í ymsum havnagjøldum, soleiðis sum vit hava greitt frá í aðrari grein her á síðuni.

Hann sigur, at uppgávan hjá Strandferðsluni er at binda oyggjar saman. Men fara kommunur nú at leggja fleiri gjøld á okkum, er tað avgjørt ikki til frama fyri siglingina, sigur hann.

– Tað fer uttan iva at darva siglingini, sigur hann.

Hann sigur, at annars er tað ein politiskur spurningur, hvussu Strandferðslan skal fíggja hesi hækkandi gjøldini.

Spurningurin er, um Strandferðslan fer at fáa eykajáttan til hesi gjøldini, ella um hon má finna peningin í sjálvum rakstrinum. Eftir uppskotinum til fíggjarlóg fyri næsta ár, er ikki nógv sum bendir á, at ætlanin er at Strandferðslan skal fáa eykajáttan. Í ár er játtanin til Strandferðsluna góðar 66 milliónir, umframt eina eykajáttan. Næsta ár er ætlanin, at Strandferðslan skal fáa góðar 69 milliónir, men tað fer alt til hækkandi lønir og aðrar útreiðslur, sum eru hækkaðar.

Og skal Strandferðslan sjálv betala tey hækkandi havnagjøldini av síni egnu játtan, kann hetta gerast ein stórur smeitur fyri suðuroyingar.

– Nú skal eg ikki gera nakrar niðurstøður í óðum verkum. Men beint nú haldi eg, at tað er mest sannlíkt, at tey hækkandi havnagjøldini mugu skrivast uppá tær leiðir, sum tey raka og tað er fyrst og fremst suðuroyarsiglingin.

– Sostatt fer undirskotið á suðuroyarsiglingini at veksa munandi og tað kann koma at føra við sær, at siglingin verður munandi skerd so at vit fáa hildið játtanina, sigur Kristian Davidsen.

Strandferðslan er í sambandi við tær kommunur, sum hava kravt at gjøldini hækka og eitt nú verður fundur við Tvøroyrar Kommunu í næstum.

Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri heldur ikki, at kravið frá kommununi er órímiligt, tí Smyril liggur við bryggju á Drelnesi minst helvtina av døgninum.

– Vit halda tí ikki, at tað er órímiligt, at Strandferðslan rindar tað sama sum oljubátar og farmabátar, sum eisini brúka Drelnes, men hóast vit hava kravt 152.000 krónur um mánaðin, fær Strandferðslan nakað í avsláttri, tí að er ikki heilt so nógv, sum hon skuldi goldið av røttum eftir støddini á Smyrli.

# Krevja fleiri milliónir frá Strandferðsluni

**Tvøroyrar og Vestmanna Kommuna hava stevnt Strandferðsluni men størsta kravið hevur Tórshavnar Kommuna.**

STRANDFERÐSLAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*




*Fáa fleiri kommunur sín vilja, fara útreiðslurnar hjá Strandferðsluni til ymisk havnagjøld at hækka fleiri hundrað prosent nú. Harðast verður Smyril raktur*

Nú skal Strandferðslan ikki sleppa so lætt longur.

Tað halda nakrar kommunur, sum skip hjá Strandferðsluni sigla til.

Fleiri kommunur krevja nú, at Strandferðslan skal betala fleiri milliónir afturat um árið í ymsum havnagjøldum.

Higartil hevur Strandferðslan havt serligar sømdir og hevur betalt nógv minni fyri at brúka ymsar havnir, enn hon átti at gjørt eftir støddini á skipunum.

Men hesar sersømdir ætla fleiri kommunur nú at taka frá Strandferðsluni. Ístaðin krevja tær, at hon skal betala so at siga fullan takst eftir støddini á skipunum.

Tvær kommunur hava enntá stevnt Strandferðsluni eftir havnagjøldum, brúgvagjøldum og vørugjøldum.

Á Drelnesi hevur Strandferðslan goldið 58.000 krónur um mánaðin fyri at Smyril kann leggja at har.

Men nú krevur Tvøroyrar Býráð, at Strandferðslan skal betala 152.000 krónur um mánaðin.

Og Tvøroyrar Kommuna krevur, at tað skal Strandferðslan gera við afturvirkandi kravt frá 1. august í 2002.

Sostatt er kravið frá Tvøroyrar kommunu ímóti Strandferðsluni nú komið upp á slaka hálva aðru millión, og tað veksur fyri hvønn mánað, Strndferðslan ikki betalir.

Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri sigur, at tað hevur ikki nyttað at kravt peningin inn frá Strandferðsluni og tí hevur Býráðið nú stevnt Strandferðsluni.

Í Vestmanna hevur Strandferðslan goldið 50.000 um mánaðin, men Vestmanna Kommuna krevur nú, at hon skal betala 158.000 krónur um mánaðin frá 1. apríl, 2002 at rokna.

Sostatt er kravið frá Vestmanna Kommunu nakrar hundrað túsund krónur og tað veksur ikki, tí, sum øll munnu vita nú, er undirsjóvartunnil komin Vestur í Vágar og sostatt er ongin sigling meiri.

Størsta kravið ímóti Strandferðsluni hevur Tórshavnar Kommuna. Higartil hevur Strandferðslan goldið 700.000 krónir um árið til Tórshavnar Havn, fyri at Smyril og Ternan kunnu leggja at har.

Men næsta ár krevur kommunan, at Strandferðslan skal betala 2,5 milliónir um árið, sambært Útvarpi Føroya. Og Tá ið nýggi Smyril kemur í oktober næsta ár, skal Strandferðslan betala einar fýra milliónir um árið í ymsum gjøldum til Tórshavnar Havn.

Hinvegin krevur Tórshavnar Kommuna ikki, at Strandferðslan skal betala nakað við afturvirkandi kraft.

Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at millum annað krevur Tórshavnar Havn, at Strandferðslan skal betala tvær krónur fyri hvørt ferðafólk, átta krónur fyri hvønn persónbil og 14 krónur fyri hvønn av lastbilar og vørubilar, umframt brúgvagjøld og havnagjøld.

Sum stjórin á Strandferðsluni sigur í aðrari grein her á síðuni, kann hetta koma at raka suðuroyingar serliga hart.



# Floksformenn svíkja

**Tað eru floksformenninir, sum hava ábyrgdina av, at tingfólk bera seg hampiliga at og sýna fólkum við øðrum hugsanum virðing. Tað heldur Jógvan Sundstein, fyrrverandi løgtingsmaður, sum øtast um ljóta málburðin á tingi seinastu árini**

MÁLBURÐUR
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*



*TAK BÓLTIN. Gomlu politikararnir fóru eftir bóltinum og ikki manninum, sigur Jógvan Sundstein, fyrrverandi løgtingsmaður, løgmaður og løgtingsformaður*

Málburðurin í løgtinginum er á lágum støði, og tað er nógv versnað.

Tað sigur Jógvan Sundstein, fyrrverandi løgmaður. Hann sat á løgtingi fyri Fólkaflokkin í 24 ár og fór úr politikki fyri 10 árum síðan. Hann øtast um, hvussu tikið verður til í politikki. Seinasti tilburðurin var, at Katrin Dahl Jakobsen samanbar Høgna Hoydal við nasistarnar undir øðrum heimsbardaga og Kristian Magnussen ábendi, at samband var millum Tjóðveldisflokkin og terroristafelagsskapir.

Formansskapurin átti at átalað í báðum førum og helst beinanvegin, heldur Jógvan Sundstein, og tað er ikki nøkur umbering, at tað í tí eina førinum var talan um ein spurning, tí tey, sum hoyrdu orðaskiftið, skiltu væl, at talan var um eina grova skuldseting. Hann hevði ynskt, at talan var eitt hendiligt óhapp og eitt undantak frá regluni um ein góðan fundarsið, men tað heldur hann ikki.

– Eg eri bangin fyri, at hesin málburðurin er komin fyri at vera. Tað er vorðið meiri alment at taka so harðliga til orðanna, og eg haldi, at tað er vorðið verri, og at støðið er lækkað, síðan eg fór úr politikki, sigur Jógvan Sundstein bersøgin.

### Virdu onnur

Tað mangan gekk lívliga fyri seg, men tað kom ikki fyri, at heimsins bølmenni vóru drigin upp í leikin, heldur fyrrverandi løgtingsmaðurin.

– Orðadrátturin kundi mangan vera hvassur, og tað var heitt viðhvørt. Men farið var aloftast eftir bóltinum og ikki manninum. Vit vóru ikki teir beru einglar, og onkuntíð varð tað eisini persónligt, men eg havi ongantíð upplivað slíkt í mínari tíð, sum vit hava verið vitni til seinastu dagarnar. Tingmenn høvdu hóast alt virðing fyri hvørjum øðrum, hóast teir mangan vóru ósamdir, sigur hann.

Tað er komið ov langt, heldur Jógvan Sundstein, sum altíð var vanur at vera siðiligur sjálvur, men hann hevur onga einfalda forkláring uppá, hví tað er komið so vítt.

– Støðið er lækkað so við og við. Tey ungu fólkini, sum koma til, ímynda sær, at tað skal vera persónligt. Onki er nóg gott. Andstøðan heldur, at hon skal vera ímóti øllum, sum samgongan kemur við, og samgongan tekur ikki undir við nøkrum, sum andstøðan skjýtir upp. Alt er negativt, sigur Jógvan Sundstein.

### Ein formansuppgáva

Sjálvsstýrisstríðið kann tykjast vera neistin, sum aftur og aftur festir í fjúsið hjá summum politikarum. Men Jógvan Sundstein, sum er sannførdur sjálvstýrismaður, ivast í, um tað kann vera rætt.

– Sjálvstýrismálið er rótin til alt ónt hjá summum. Allar ólukkur komast av, at blokkurin er skorin, men tað er møsn og tvætl. Hinvegin haldi eg ikki, at nakar ávísur flokkur er betri enn nakar annar. Kortini kann eg siga, uttan at nevna nøvn, at summir persónar eru minni fólkaligir enn aðrir, sigur Jógvan Sundstein.

Hann var sjálvur formaður í Fólkaflokkinum í áravís, og tað er í flokkunum, at politikarar eiga at alast upp.

– Formansskapurin á løgtingi hevur sjálvandi yvirskipaðu uppgávuna at stýra orðaskiftinum, men tað áliggur floksformonnunum at fáa eina góða floksdissiplin. Floksformaðurin skal uppdraga síni fólk, so tey bera seg hampiliga og siðiliga at. Tað uppgávuna hava teir ikki dugað nóg væl, er greiða niðurstøðan hjá Jógvani Sundstein.

# Ongin avleiðing í flokkinum

**Tað hevur ongar avleiðingar fingið fyri Katrina Dahl Jakobsen, at hon tók ov harðliga til orðanna undir fíggjarlógarviðgerðini. Jóannes Eidesgaard heldur ikki, at tað er uppgávan hjá formanninum at halda í oyruni á sínum fólkum. Tey eiga sjálv at kenna sær hógv**

MÁLBURÐUR
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Formansskapurin hjá løgtinginum kom til eina niðurstøðu. Tað var ikki rætt av javnaðarkvinnuni Katrin Dahl Jakobsen at samanbera aðrar politikarar við nasistarnar undir øðrum heimsbardaga undir fíggjarlógarviðgerðin.

Hendan niðurstøða hevur kortini ikki ført til nakra endurskoðan ella sjálvrannsakan í Javnaðarflokkinum, og Katrin Dahl Jakobsen hevur heldur onga átalu fingið frá leiðsluni.

– Vit kunnu bara taka átaluna til eftirtektar, men vit hava ikki viðgjørt málið enn, tí vit hava als ikki fingið nakað skrivligt frá formansskapinum, og tí hava vit heldur ikki gjørt nakra niðurstøðu, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum.

Orðaskiftið er mangan hart, viðgongur Jóannes Eidesgaard, og fólk leypa onkuntíð framav, men hann er kortini ikki samdur við Jógvan Sundstein, tá hann sigur, at orðaskiftið er farið av sporinum og er á lægri stigi, enn tað plagdi at vera.

– Vit skulu minnast til, at Jógvan Sundstein sjálvur var ein framúr siðiligur og hampiligur maður, sum ongantíð hevjaði røddina ella var óskikkiligur. Tað vóru aðrir, sum vóru harðmæltari og tóku harðliga til orðanna, men sjálvandi gongur eitt mark onkustaðni, sigur Jóannes Eidesgaard.

Tað hevði verið tiltrongt, um tingið viðgjørdi, hvat er góður málburður, heldur hann. Tað týdningarmesta er, at øll fáa eins viðgerð, men tað ivast hann í, um øll fáa í dag.

– Tað, sum er mest umráðandi, er at øll vera viðfarin líka. Eg havi sjálvur merkt á mínum egna kroppi, hvussu tað er at vera lagdur undir líkt og ólíkt og havi eitt nú fingið at vita, at eg eri landasvíkjari. Vanliga gevur tað deyðarevsing at svíkja landið, men formansskapurin ikki so mikið sum átalaði ta ferðina, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann tekur ikki undir við, at tað eru formenninir, sum skulu halda í oyruni á sínum fólkum. Tað eigur at vera upp til hvønn tingmannin sær.

– Tað kann ikki vera okkara uppgáva at taka fólkavaldar politikara í skúla. Teir mugu sjálvir finna sín leist í tinginum, og tað gongur skjótt upp fyri teimum, hvat er borðbært. Hinvegin kundi tað verið eitt hugskot, um vit fingu meiri dissiplin í flokkunum við at broytt mannagongdir. Um flokkarnir hildu seg til at hava framsøgumenn, sum taka sær av ávísum málum, so slapst kanska undan, at alt fór upp at gartera í tinginum, tí tað er tá, at orðaskiftið verður so torført at stýra, sigur Jóannes Eidesgaard.

Tey, sum hildu, at málið um málburðin í tinginum, steðgaði við niðurstøðuni hjá formansskapinum, fóru skeiv. Í blaðnum í gjár legði Jóannes Eidesgaard harðliga eftir Tjóðveldisflokkinum, og í dagsins blaði fær hann aftur av somu skuffu.

# Filmseftirlitið yvirlivir kanska

**Mentanarnevndin hjá løgtinginum tekur ikki undir við at strika játtanina til Filmseftirlitið á fíggjarlógini fyri 2004. Tað gongur fram av hennara ummæli av fíggjarlógini**

FÍGGJARLÓG 2004
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Peningur eigur at vera settur á komandi fíggjarlóg til Filmseftirlit. Tað sigur Mentanarnevndin.

– Nevndin er av teirri áskoðan, at á komandi fíggjarlóg eigur peningur at verða settur av undir teirri fortreyt, at løggávan, sum er galdandi í dag, eisini er í gildi komandi ár. Hetta merkir, at játtan eigur eitt nú at verða sett av til filmseftirlit og lærlingastuðul soleiðis, sum galdandi løggáva krevur. Verður løggávan broytt í komandi fíggjarári, so eiga fíggjarligu avleiðingarnar av hesum at verða tiknar við í einum eykajáttanarlógaruppskoti, sigur ein samd Mentanarnevnd.

Hon ger eisini vart við, at í mun til, hvussu stór upphæddin er á fíggjarlógini til Fólkaskúlan, so er hon ov lítið útgreinað, og nevndin ætlar sær at biða fíggjarnevndina um at útvega sær eina slíka útgreining.

Andstøðuumboðini í nevndini vísa eisini á, at játtanin til Fólkaskúlan onga hóming gevur av, hvørja ávirkan skipanin við ársverkum fer at hava á játtanina. Minnilutin harmast eisini um, at stuðulin til skúlabarnaflutning verður tikin av, tí tað fer serliga at raka smærri kommunurnar við veikum skattagrundarlagi.

Andstøðuumboðini í nevndini átala eisini, at ætlanin er at lækka stuðulin til læruplàss við 25 prosentum.